Friggjadagur 21. november 2008

# VARPIÐ



SvF • Leygardag 22. kl. 20.10

## »Star Wars: The Empire Strikes Back«

Luke Skywalker, Han Solo og Leia prinsessa krógva seg á ísgongustjørnuni Hoth. Men Darth Vader eltir tey, og legan, har tey halda til, verður álopin. Eftir hart stríð fara tey av leguni, og øll fara hvør í sína ætt. Luke Skywalker skal til gongustjørnuna Dagobah, har hann skal í læru sum Jedi riddari hjá lítlu veruni Yoda. Am. framtíðar ævintýrfilmur frá 1980/1997



SvF • Sunnudag 23. kl. 20.00

## »Robert« - 2:2

Í fyrru sendingini síðsta sunnukvøld um føroysku rocklegenduna Robert McBirnie, hoyrdu vit m.a. um barna- og ungdómsár hansara, alskin til sjógvin og lærarayrkið, og ættarbond hansara til Onglands og Avstralia. Í hesi seinnu sendingini fara vit aftur um tónleikaran, skemtaran, yrkjaran og ítróttar- og familjumannin Robert. Lagt sendingarnar til rættis hava Leivur Hansen og Bárður Veihe.



Discovery • Leygardag 22. kl. 16.30

## »Forklaring følger...«

Her fær hyggjarin innlit í viðurskifti, sum vit í gerandisdegnum taka sum eina sjálvfylgju, hvussu ymskir lutir og funktiónir verða framleiddar. Í kvølde eru evnini hydroelektriskar vatnbyrgingar og so mikrochippið.

Sosialurin

Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið